# Vit hava verið fyri órætti



*Simona Petersen (13) kastaði bóltin aftur til málverjan, tá dómararnir floytaðu fyri passivum spæli*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## DÓMARARNIR SIGA EINKI

*Karsten Joensen, annar av dómarunum, hevur onga viðmerking til hendingina leygardagin*

**HONDBÓLTUR** Tjaldur hevur kært dystin móti VB. Dómararnir dømdu púra skeivt, og tað hevði við sær, at kvinnurnar úr Runavík taptu eitt stig, metir nevndin. – Tað vilja vit gera vart við, sigur næstformaðurin

Uni Holm Johannesen

Nevndin í Tjaldri ger nú manngarð um sínar leikarar. Tær hava verið fyri órøttum, er greiða niðurstøðan hjá Niels Peter Bech, sum er næstformaður.

– Tær harmast støðuna almikið, og tað er ótrúliga keðiligt at fáa ein slíkan endi undir vangan beint fyri steypafinaluna, sigur hann.

Støðan er íkomin, tí Karsten Joensen og Kristian Joensen, sum dømdu dystin, bóðu um at steðga tíðini. Tá var Tjaldur á odda við einum máli. Dómaraborðið fekk ikki boðini, og tí løgdu dómararnir átta sekund afturat. Tjaldur gav bóltin upp, og Simona Petersen kastaði aftur til Guðruna í Lágabø, sum var málverji. Ætlanin var, sambært Niels Peteri Bech, at málverjin skuldi kasta langt fram til Heidi Sevdal, tí gestirnir vardu seg langt uppi á vøllinum. Tað fekk Guðrun ongantíð møguleikan til, tí dómararnir floytaðu fyri passivum spæli. Tá VB fær bóltin, vil nevdin í Tjaldri vera við, at óregulsemi er farið fram.

Í kæruni til Hondbóltssambandið hevur Tjaldur sent eina frágreiðing, umframt eitt videoklipp, sum vísir, hvat fer fram seinastu sekundini.

Dysturin endaði 29-29.

### Einki avgjørt

Niels Peter Bech ger greitt, at úrslitið hevur ongan avgerandi týdning. Men felagið metir seg vera fyri órætti, og tí vil nevndin gera vart við støðuna.

Tjaldur er nummar tvey, sum gevur atgongd til finaluna. Neistin, sum er nummar trý, hevur tvey stig færri og spælt ein dyst minni.

– Tað er hinvegin so tætt í oddinum, at eitt stig kann vísa seg at vera avgerandi. Vit halda, at vit hava tapt eitt stig, sum ikki var rætt, og tað vilja vit gera vart við, sigur hann.

*uni@sosialurin.fo*

# Vilja hava umdyst

– Út frá hesum krevur Hondbóltsfelagið Tjaldur, at VB málið verður strika og harvið at Tjaldur fær 2 stig, ella at nýggjur dystur verður leiktur, skrivar Tjaldur í kæruni

## Kæra í samband við dystin millum Tjaldur og VB í Sunset deildini 05.02.2011, í Runavík

### Dystur nr: D160

**Frágreiðing um hending móti dystarenda:**
Móti dystarenda gevur Karstin tekin um at steðga tíðini, men dómaraborðið hevur ikki sæð tað. Dómararnir velja at leggja 8 sekund afturat dystinum, tí Karstin metur at VB leikarar standa ov nær, tá Tjaldur skal geva bóltin upp.
Hetta meta vit er at geva VB fyrimun fyri óreglusemi, sum tey sjálvi eru orsøk til. Vit meta at heldur átti tíðin at koyrt víðari, og VB fingið boð um at flutt seg tríggjar metur burtur frá miðjuni.

**Frágreiðing um næstu hending**
Tá Tjaldur gevur bóltin upp, kastar Simona Petersen hjá Tjaldur bóltin aftur til málmannin hjá Tjaldur, Guðrun í Lágabø, sum er stødd umleið á tríggjarmetrinum. Guðrun skal til at kasta ein langan bólt fram til Tjaldur leikara, Heidi Sevdal . Hendan hendingin tekur áleið 3 sekund. Uttan at gera tekin um passivt spæl, floytar dómarin, Kristian Joensen, fyri passivum spæli. Hetta gevur fríkast til VB, sum skal takast uttanfyri tríggjarmeturin. Eisini skulu allir aðrir leikarar hjá VB út um tríggjarmetur feltið.
VB leikari, Guðri Mortensen, gevur bóltin upp til VB leikara, Báru Mortensen, samstundis sum annar VB leikari, Laila Jespersen, er stødd umleið á 6-metrinum, har hon screenar fyri Tjaldur leikara, Anniku Thomsen, sum ikki er loyvt tá eitt fríkast ella straffi skal takast. Víst verður til spælireglurnar 13:6 og 13:7 – Hetta bleiv gjørt dómarunum kunnugt beinanvegin, men einasta teir vildi fyrihalda seg til var at teir høvdu dømt út frá grein 7:12.
At dómarin, sum út frá video upptøkunum, er staddur 3 metur frá hendingini, ikki sær hesa støðu, hevur alt avgerandi ávirkan á dystin. Tjaldur hevði møguleika til tvey stig, men VB fær javna og harvið fáa bæði liðini 1 stig í part.
Út frá hesum krevur Hondbóltsfelagið Tjaldur, at VB málið verður strika og harvið at Tjaldur fær 2 stig, ella at nýggjur dystur verður leiktur.
Tjaldur ynskir eisini at fáa eina frágreiðing um hví støðan frá tí Tjaldur gevur bóltin upp, og 2 og eitt hálvt sekund fram, skal dømast sum passivt spæl.
Vísast kann til líknandi hending tá Sámal Paulason og Kári Hansen dømdu Neistan og VÍF fyri nøkrum árum síðan. Tá fekk VÍF umdyst eftir at dómararnir høvdu gjørt ein avgerandi feil.

P.s Viðheft er video upptøka av seinastu sekundunum av dystinum.

**Vinarliga**

**Hondbóltsfelagið Tjaldur**

# Líknandi støða

**HONDBÓLTUR** Ein líknandi støða, sum tann í Runavík um vikuskiftið, var fyri tveimum árum síðan, tá Hondbóltssambandið gjørdi av, at mansliðini hjá Neistanum og VÍF skuldu spæla landskappingardyst umaftur

Uni Holm Johannesen

Neistin vann upprunaliga 38-37. Tað, sum fekk øði í vestmenningar, var ein hending stutt fyri steðgin. VÍF hevði tríggjar-metra kast, tá tvey sekund vóru eftir. Sámal Joensen royndi seg við beinleiðis skoti. Dómararnir blástu tíðina ígongd beinanvegin, og tí ljóðaði lúðurin, samstundis sum skotið frá Sámali Joensen fór í meskarnar. Dómararnir gjørdu av, at málið skuldi ikki telja við, og tí vóru vestmenningar heldur skakkir, tá teir eftir steðgin komu eftir, at teir høvdu ikki eins nógv mál, sum teir hildu seg hava. Við tepra tapinum í huga valdi VÍF at kæra dómaraavgerðina, og teir fingu viðhald.

»Vísandi til, at dómararnir í sambandi við fríkastið, ið var dømt beint fyri hálvleik, tóku eina skeiva avgerð við ikki at lata VÍF taka fríkastið umaftur, og tað vísandi til úrslitið í dystinum ikki kann avvísast, at hendan skeiva avgerðin hevur havt avgerandi týdning fyri úrslitið á dystinum, hevur Kappingarnevndin avgjørt at geva VÍF viðhald í klagu síni, soleiðis at úrslitinum á dysti nr. A134 millum Neistan og VÍF, tann 18. januar 2009 verður ógildað, og dysturin verður spældur av nýggjum,« skrivaði Hondbóltssambandið.